Børn hjálpa børnum

Fríggjadagin 18.11.2022 verður afturvendandi tiltakið "Børn hjálpa børnum" og fer innkomni peningurin í ár til børnini á Sjúklingahotellið Tórshavn.

Vit í 8. flokki ynskja sjálvsagt at luttaka.

Vit vita, at næmingar í 8. flokki standa í vøkstri, bæði kropsliga og í sinni. Hetta hevur kanska við sær at fleiri av tykkum eiga klæðir og lutir, ið tit ikki longur hava brúk fyri. Somuleiðis vilja vit eisini taka í grønu leiðina, ið Skúlin við Løgmannabreyt - ársins grøni skúli 2022 - hevur sett fyri dagin. Tí fara vit í ár at hava loppumarknað, har vit fara at selja klæðir og alskyns lutir.

Tí fara vit at heita á tykkum, um at finna 3 pløgg og/ella lutir, ið tit ynskja at lata.

Tað hevur týdning, tá tit velja hvat tit kunnu lata, at:

- Klæðir eru heil, rein og sum heild lítið slitin.
- At lutirnir eru í góðum standi og hava eitt nýtslu- ella prýðisvirði.

Vónandi taka tit væl undir við hesum 😊

Toymið í 8. flokki